## Tveir live-dystir á Rás2

Rás2 verður við hjá monnum og kvinnum, tá avgerðirnar um FM-heitið í fremstu røðunum kunnu fella sunnudagin. Á Argjum hava KÍ-kvinnurnar møguleikan at tryggja sær sítt 10. Meistaraheiti á rað. Og skuldi tað ikki eydnast at vunnið, er ein javnleikur móti AB helst eisini nóg mikið, tá alt kemur til alt. Tann dysturin byrjar klokkan 13, og klokkan 15 verður so farið í Gundadal, har Hilmar Jan og Jákup fara at siga frá gulldystinum millum HB og KÍ. Ein dystur, sum kanska eisini verður seinasti stóri klassikarin í føroyskum fótbólti.



## Hondbólturin byrjar leygardagin

Sum tað framgongur av dystaryvirlitinum her á síðuni, so byrjar føroyska hondbóltskappingin aftur um vikuskiftið. Hjá monnum verður lagt fyri við dysti millum meistararnar úr H71 og steypavinnararnar úr Neistanum. Tann dysturin skuldi upprunaliga verða spældur sunnudagin, men er nú fluttur til leygardagin, tá tey í Hoyvík annars óttast, at størsti parturin av potentiellu áskoðarunum heldur vildu farið í Gundadal.




EB/Streymur hevur enn møguleikan at røkka HB. Tað krevur sjálvandi, at HB snávar í sínum dysti, men fyrst og fremst skal EB/Streymur vinna sín dyst

# Metalbiðlar á heimavølli

**NSÍ, B68 og EB/Streymur eiga øll heimavøll sunnudagin, tá tey kunnu styrkja sína støðu í stríðnum um heiðursmerki**




Jákup Mørk

Felags fyri tey trý er mest av øllum, at tað er vandin fyri fiasko heldur enn tráðanin móti silvurinum, sum lúrir í bakhøvdinum. Ikki minst tí einki av mótstøðuliðunum nú hevur nakað serligt at spæla fyri.

Best stendur til hjá EB/Streymi, sum við einum sigri kann vinna seg heilt nær eini staðfesting av silvurmerkjunum – og kanska staðfesta tey, um Víkingur ikki vinnur sín dyst, men fyrst og fremst man vónin har vera, at HB snávar í Havn.

Hendir tað, so kann avgerðin um meistaraheitið nevnliga bíða til seinasta leikdag, um EB/Streymur bara greiðir sín setning.

Í Runavík vitjar AB, sum fyrr í ár skelkaði NSÍ við útisigri í júst Runavík, men nú ikki hevur tað heilt stóra at spæla fyri.

Tapið hjá NSÍ í Gundadali setti teir nakað aftur í heiðursmerkjastríðnum, og tí er heldur eingin ivi um, at teir ætla sær sigurin hesaferð.

Og á Toftum vitjar longu niðurflutta 07 Vestur hjá B68, sum enn hevur sínar vónir um metal intaktar. Og í øllum førum kunnu toftamenn framveigs sjálvir gera av, um teir spæla europiskan fótbólt næsta ár.

## vodafone deildin

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 25 | 14 | - | 7 | - | 4 | 52 | 33 | 19 | 49 |
| 2 | EB/S | 25 | 13 | - | 5 | - | 7 | 51 | 32 | 19 | 44 |
| 3 | Víkingur | 25 | 12 | - | 5 | - | 8 | 46 | 33 | 13 | 41 |
| 4 | B68 | 25 | 11 | - | 6 | - | 8 | 44 | 40 | 4 | 39 |
| 5 | NSÍ | 25 | 11 | - | 5 | - | 9 | 50 | 44 | 6 | 38 |
| 6 | AB | 25 | 9 | - | 7 | - | 9 | 28 | 31 | -3 | 34 |
| 7 | ÍF | 25 | 8 | - | 6 | - | 11 | 42 | 42 | 0 | 30 |
| 8 | B36 | 25 | 7 | - | 6 | - | 12 | 33 | 48 | -15 | 27 |
| 9 | KÍ | 25 | 6 | - | 6 | - | 13 | 28 | 51 | -23 | 24 |
| 10 | 07 Vestur | 25 | 4 | - | 7 | - | 14 | 37 | 57 | -20 | 19 |

**Formbarometrið**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 16 | 7 | 9 | 13 |
| 2 | KÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 6 | 10 | -4 | 10 |
| 3 | B36 | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 11 | 11 | 0 | 9 |
| 4 | AB | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 8 | 8 | 0 | 9 |
| 5 | ÍF | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 15 | 12 | 3 | 8 |
| 6 | 07 Vestur | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 11 | 10 | 1 | 8 |
| 7 | Víkingur | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 9 | 8 | 1 | 7 |
| 8 | B68 | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 7 |
| 9 | HB | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 4 | 7 | -3 | 5 |
| 10 | NSÍ | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 8 | 13 | -5 | 5 |

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 25 | 14 | - | 6 | - | 5 | 60 | 40 | 20 | 48 |
| 2 | B71 | 25 | 13 | - | 7 | - | 5 | 56 | 35 | 21 | 46 |
| 3 | HB | 25 | 13 | - | 6 | - | 6 | 55 | 35 | 20 | 45 |
| 4 | TB | 25 | 13 | - | 5 | - | 7 | 53 | 43 | 10 | 44 |
| 5 | B68 | 25 | 10 | - | 6 | - | 9 | 61 | 49 | 12 | 36 |
| 6 | NSÍ | 25 | 9 | - | 6 | - | 10 | 44 | 49 | -5 | 33 |
| 7 | Víkingur | 25 | 7 | - | 10 | - | 8 | 38 | 35 | 3 | 31 |
| 8 | Skála | 25 | 8 | - | 5 | - | 12 | 36 | 38 | -2 | 29 |
| 9 | FC Hoyvík | 25 | 9 | - | 1 | - | 15 | 31 | 53 | -22 | 28 |
| 10 | MB | 25 | 2 | - | 2 | - | 21 | 27 | 84 | -57 | 8 |

**1. deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 18 | 15 | - | 2 | - | 1 | 90 | 7 | 83 | 47 |
| 2 | AB | 18 | 14 | - | 3 | - | 1 | 50 | 7 | 43 | 45 |
| 3 | Víkingur | 18 | 9 | - | 4 | - | 5 | 36 | 23 | 13 | 31 |
| 4 | Skála | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 24 | 44 | -20 | 22 |
| 5 | EB/Streymur | 18 | 2 | - | 1 | - | 15 | 8 | 66 | -58 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 18 | 1 | - | 1 | - | 16 | 7 | 68 | -61 | 4 |

## Dystaryvirlit

### Fótbóltur

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 27.09 | HB-KÍ | Eiler Rasmussen |
| 27.09 | EB/S-ÍF | Ransin N. Djurhuus |
| 27.09 | NSÍ-AB | Petur Reinert |
| 27.09 | Víkingur-B36 | Dagfinn Olsen |
| 27.09 | B68-07 Vestur | Lars Muller |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 26.09 | VB/S-MB | Birgir Sondum |
| 26.09 | NSÍ-Skála | Rúni Gaardbo |
| 26.09 | HB-B71 | Alex Troleis |
| 26.09 | B68-Víkingur | Jón Kári í Brekkuni |
| 26.09 | FC Hoyvík-TB | Jóhan Petur Michelsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 27.09 | AB-KÍ | Jóhan Petur Michelsen |
| 27.09 | Víkingur-Skála | Elsa Andreasen |
| 27.09 | B68/NSÍ-EB/S | Janus Petersen |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 26.09 | 15.00 | VB-Neistin |
| 27.09 | 15.00 | Stjørnan-VÍF |
| 28.09 | 19.00 | Tjaldur-StÍF |

**Atlantic Airways-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 26.09 | 16.00 | H71-Neistin |
| 27.09 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 27.09 | 16.00 | KÍF-VÍF |